Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 46

ISSN 0907-905X

Nr. 151 6. desember 2011

**Kunngerð**
**um**
**gjøld innan eldrarøktina**

Við heimild í § 32, stk. 1 og 4 í „Lov for Færøerne om offentlig forsorg" sbrt. lógarkunngerð nr. 100 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 26. mai 2011, verður ásett:

**§ 1.** Pensjónistur, sum fær uppihald á ellis- og røktarheimi ella á eldrasambýli, skal rinda eitt mánaðarligt gjald fyri vistarhaldið, ið fevnir um húsaleigu, olju, el, mat, felags útreiðslur o.t.
*Stk. 2.* Á eldrasambýlunum verður gjaldið kravt inn av kommununum, og á ellis- og røktarheimum krevur landið gjaldið inn.
*Stk. 3.* Á røktarheimi og sambýlum í Sandoynni krevur landið gjaldið inn.

**§ 2.** Allir pensjónistar rinda fyri tænastuna á ellis- og røktarheiminum ella á eldrasambýlinum. Gjaldið fevnir m.a. um røkt og praktiska hjálp.
*Stk. 2.* Gjaldið er treytað av inntøkuni hjá pensjónistinum og verður rindað til landið.

**§ 3.** Gjald sambært §§ 1 og 2 verður rindað, áðrenn 1. í tí mánaði, goldið verður fyri.
*Stk. 2.* Goldið verður fyrstu ferð við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin, flutt verður inn.
*Stk. 3.* Um pensjónistur ynskir at innrætta býlið á serligan hátt, kann krevjast, at hann rindar eykaútreiðslur, ið standast av at seta býlið aftur í uppruna stand.
*Stk. 4.* Gjald sambært §§ 1 og 2 verður rindað seinastu ferð við endan av tí mánaði, flutt verður út ella pensjónistur andast.

**§ 4.** Pensjónistur kann vera til umlætting á ellis- og røktarheimi ella á eldrasambýli í mesta lagi í 90 dagar í einum ári.
*Stk. 2.* Eitt samdøgursgjald verður rindað fyri vistarhaldið undir umlættingini frá fyrsta degi.
*Stk. 3.* Goldið verður eina ferð um mánaðin fyri umlætting, sum er veitt mánaðin fyri.

**§ 5.** Pensjónistur ger skrivliga avtalu um gjaldstreytirnar á ellis- og røktarheiminum ella á eldrasambýlinum, tá flutt verður inn.

**§ 6.** Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri gjøld innan eldrarøkt frá og við januar 2012.

Almannamálaráðið, 6. desember 2011

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

Nr. 152 8. desember 2011

# Kunngerð um broyting í kunngerð um eldrarøkt í Sandoynni

**§ 1**

Í kunngerð nr. 7 frá 27. januar 2003 um eldrarøkt í Sandoynni verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
„**§ 1.** Tá ein pensjónistur fær uppihald á røktarheimi ella í sambýli í Sandoynni, rindar hann fyri vistarhald og tænastur sambært ásetingunum í kunngerð um gjøld innan eldrarøktina.“

2) § 2 verður strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2012.

Almannamálaráðið, 8. desember 2011

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

Nr. 153 8. desember 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um eldrasambýli**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 67 frá 18. mai 2006 um eldrasambýli verða §§ 8 og 9 strikaðar.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2012.

Almannamálaráðið, 8. desember 2011

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um gjald fyri heimahjálp

### § 1

Í kunngerð nr. 4 frá 28. januar 2010 um gjald fyri heimahjálp verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Pensjónistur, hvørs hjúnafelagi fær varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, rindar fyri heimahjálp sum stakur pensjónistur frá mánaðinum aftaná, at hjúnafelagin er fluttur inn.“

2) § 1, stk. 3 verður strikað.

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað fyri gjøld frá og við januar mánað 2012.

Almannamálaráðið, 8. desember 2011

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

Nr. 155 8. desember 2011

## Kunngerð um broyting í kunngerð um heimahjálp

**§ 1**

Í kunngerð nr. 101 frá 24. juli 2000 um heimahjálp verður í § 8, stk. 5 og 6 strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2012.

Almannamálaráðið, 8. desember 2011

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

Nr. 156 12. desember 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um gjøld fyri løggilding av elinnleggjarum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 111 frá 17. oktober 1994 um gjøld fyri løggilding av elinnleggjarum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 28 frá 11. apríl 2011, verður í § 1, stk. 2 og stk. 3 í staðin fyri „1.700,00 kr.“ sett: „1.000 kr.“.

**§ 2**

Hendan kunngerð kemur í gildi 1. januar 2012.

Vinnumálaráðið, 12. desember 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705